# Trampað til deyðis

Ein kvinna varð trampað til deyðis av einari neytagongu, sum gjørdist frá sær sjálvari. 45-ára gamla kvinnan var úti og spákaði túr við hundinum, sum eftir øllum at døma hevur goy nakað illa. Eingin sá tilburðin, men roknað verður við, at tey vanliga friðarligu neytini eru vorðin bangin av hundinum og eru farin til stroks, hava runnið kvinnuna um koll og síðani trampað til deyðis. Hetta hendi bert fáar metrar frá einari fullari café, og blóðdálkaði hundurin rann innar hagar og soleiðis varð varskógvað um syndarligu hendingina. Roynt var við fyrstu hjálp, men har var einki at gera, skrivar Daily Mail.



# Fuglakrím á Fjóni

Fuglakrím er staðfest á einum høsnagarði við Stenstrup á Fjóni. Tær 2100 hønurnar verða í dag dripnar og beindar burtur. Fólk frá Fødevarestyrelsen fóru um miðdagsleitið at geva høsnunum sproytur, og roknað verður við, at hetta arbeiðið fer at taka einar átta tímar. Síðani verða høsnini beind burtur. Samstundis verður ein trygdargeiri upp á ein kilometur settur upp kring garðin. Talan er um ein mildan form fyri fuglakrími, so tað verður ikki neyðugt við einari veruligari verdarsonu, sigur Charlotte Bender, samskiftisleiðari í Fødevarestyrelsen við Politiken

*Soleiðis kanst tú fáa ein uppaftur betri miðalkarakter, sum hevur alt at siga í dag...*

politikarunum, fann eg út av, at hetta var ikki nakað, sum ein og hvør slapp. Hetta var nakað, eg kundi vera errin av, og at hetta uttan iva fór at vera læruríkt fyri meg, segði hon.

Ein tann fyrsti, hon møtti, tá hon kom inn í sambandshølini, var Edmund Joensen.

- Eg minnist, at tá hann reisti seg upp at taka í hond mína, hugsaði eg, at hann ernógv størri í veruleikanum enn í sjónvarpinum! Á fundinum lærdi Edmund meg ein hóp um samfelagsviðurskifti.

Miriam segði, at nú ein tíð er fráliðin, hevur hon veruliga fingið blóð upp á tonna.

- Nú skal tað vera, at vit ungu skulu traðka til, so vit eisini kunnu gera mun.

## Málsetningurin

Hon segði, at málið hjá Unga Sambandinum í fyrsta lagi er at røkka út til tey ungu, at kunna tey um, hvat Sambandsflokkurin vil.

Eitt nú vilja vit kunna um útbúgvingarmøguleikar, skúlaskipan, ítrótt, tónleik og annað, sum hoyrir ungdóminum til. Skulu vit fáa ung fólk úr øðrum londum at koma til Føroya, er neyðugt, at vit gera okkurt spennandi, sum kann lokka tey ungu hesa leið. Vit í Unga Sambandinum halda, at ein eftirskúli hevði verið eitt gott hugskot.

Miriam vísti á, at í flestu londum uttan um okkum er 10. flokkur næstan dottin burtur, og tey ungu leita sær heldur á eftirskúla.

- Tí halda vit, at tað átti ikki at verið nakar trupulleiki at fingið ung til Føroya á ein eftirskúla.

Sjálv gongur Miriam á studentaskúla saman við nógvum hundrað øðrum í Føroyum, og hon heldur flestu vera samd um, at tað er keðiligt at hava lærugreinar, sum ungdómur ikki kann brúka til víðari lesnað.

- Ofta er tað so, at tær lærugreinar, tú ikki hevur brúk fyri, eru tær, sum gera, at tín miðalkarakterur fellur. Hví skulu vit tá hava so at siga óneyðugar lærugreinar, spurdi hon.

Unga Sambandi heldur tí, at skúlaskipanin átti at verið soleiðis, sum hon eitt nú er í Danmark og øðrum londum, at tú kanst velja teg inn á linjur, tí tá hevur tú tær lærugreinar, sum tær dámar og hevur brúk fyri til víðari lesnað.

- Soleiðis kanst tú eisini fáa ein uppaftur betri miðalkarakter, sum hevur alt at siga í dag, legði hon aftrat.

Miriam helt eisini, at ung, sum eru undir 18 ár og ganga til víðari lesnað, eiga at fáa lestrarstuðul.

## Best í Danmark

Formaðurin í Unga Sambandinum helt, at tað, sum størstan dentin á, eru sjálvir útbúgvingarmøguleikarnir.

- Møguleikarnir eru nógvir, og torført er at velja, hvat ungdómurin ætlar sær at lesa – og hvar tey skulu fara at fáa sær sína útbúgving. Tað er rætt, at vit ungu kunnu fara til Noregs, Svøríki, Ongland og aðrastaðni at lesa, og tað haldi eg, at flestu ung eisini hava í huga.

Miriam reisti síðan spurningin, hví tað kortini man vera so, at tey flestu velja at fara til Danmarkar at lesa?

- Jú, tað er tí, at í Danmark eru bestu útbúgvingarmøguleikarnir hjá føroyingum. Ikki bert tí, at vit duga málið, men Danmark er kent fyri at hava eina av heimsins bestu útbúgvingarskipanum. Haraftrat kemur, at stuðulin, sum lesandi fáa í Danmark, er ein hin frægasti í heiminum. Og hvør tímir alla somlu tíðina at hugsa um pening, tá tú lesur?

Hon vísti á, at lond hava avtalur sínámillum um atgongd til útbúgvingar, men legði dent á, at tá føroyingar hava serlig rættindi til útbúgvingar í Danmark, er væl eingin orsøk at tveita hesi rættindi burtur.

Kortini segði Miriam seg undrast yvir, at bert 10% av føroyingum fáa sær útbúgving uttanfyri Danmark.

- Hetta er neyvan av vantandi áhuga, men heldur av vantandi útbúgvingarpolitikki.

Formaðurin í Unga Sambandinum tók eitt dømi.

- Vinkona mín, sum eigur barn, gongur eisini á studentaskúla. Hon fær 4.200 krónur um mánaðin, og tað er ringt at hugsa sær, hvussu í víðu verð hon klárar seg við so lítið av peningi. Til alla lukku býr hon heima hjá foreldrunum, men um hon hevði egin hús, hevði stuðulin verið hin sami; hon hevði tá eisini fingið 4.200 krónur um mánaðin. Hvat er tað í dag? spurdi Miriam.

Hon hevði aftrat, at henni kunnugt, fáa mammur í Danmark bústaðarstuðul, frían barnagarð og hægri stuðul annars.

- Tað kann ikki vera rætt, at føroyskar mammur eru tvungnar at flyta av landinum, tí lestrarmøguleikarnir eru betri í Danmark.

## Loysing ikki svarið

Formaðurin í Unga Sambandinum helt fyri, at tað eru tey ungu, sum eru framtíð Føroya, og tí skuldi ikki verið neyðugt um, at vit neyðturviliga mugu út í heim.

- Vit skulu ikki hava tað trið besta ella næst besta. Vit skulu hava bestu útbúgvingarmøguleikar, sum so seinnu skulu gera Føroyum og føroyingum gavn, segði hon.

Hon nevndi eisini Oyrasundkollegiið og onnur við, har nógvir føroyingar búgva undir lesnaðinum.

- Hesi eru góð dømi um, at sosialur trivnaður er týdningarmikil, tá tú sum føroyingur er í útlegd og langt burtur frá øllum sum er tær kært.

Miriam vísti á, at besta tíðin hjá nógvum føroyingum var tíðin, tá tey búðu saman við øðrum føroyingum á kollegii.

- Tað sigur seg sjálvt, at fólk vilja liva undir bestu umstøðum, tá tey lesa. Tí er



*Í øðrum blaði seinni í vikuni fara vit at vísa á ymiskt, sum eitt nú Rósa Samuelsen, Jóhan Dahl og Edmund Joensen søgdu á landsfundinum*

Mynd: Vilmund Jacobsen

umráðandi fyri okkum framhaldandi at hava eitt gott samstarv við Danmark, og hetta letur seg best gera í ríkisfelagsskapinum, legði hon aftrat.

Hon endurtók, at ríkisfelagsskapurin er okkara besta loysn.

- Vit kunnu uttan iva velja at finna onkran annan felagsskap at vera partur av, men nógv bond knýta londini í ríkisfelagsskapinum saman.

Forkvinnan í Unga Sambandinum heldur soleiðis ikki, at loysing er svarið upp á einar frælsar Føroyar.

- Orsøkirnar eru nógvar, men í stuttum er trupulleikin, at Føroyar er eitt lutfalsliga lítið land, ið skal liva av tilfeinginum, vit hava í havinum – og møguliga í undirgrundini. Hetta tilfeingið er óstøðugt, og fyri at vit skulu kunna tryggja okkara borgarum eins góð livikor, sum í londunum rundan um okkum, er neyðugt at verða partur av einum sterkum felagsskapi.

Hon segði, at tað, sum flestu ung tosa um, er spurningurin um loysing ella samband, og ofta er tað bert hesin spurningurin, sum skilir sambandsfólk og tjóðveldisfólk.

- Hvør einstaklingur hevur sína egnu týðing av, hvat frælsi er. Eg haldi, at frælsi kann lýsast á mangan hátt, og eftir mínum tykki kann tað persónliga frælsi og frælsi í felagsskapi eisini lýsast soleiðis: Vit hava frælsi til at fáa okkum útbúgving, seta búgv, fáa eitt gott starv og so framvegis. Hetta er ikki minst tí, at vit altíð hava havt ein stóran og sterkan Sambandsflokk, ið tryggjar hesi virðir og altíð hevur verið við til at menna tey, segði Miriam Michelsen, forkvinna í Unga Sambandinum á landsfundi Sambandsfloksins leygardagin.



*Tey umboðaðu Unga Sambandið á landsfundi Sambandsfloksins, Jógvan Dahl (høgrumegin Edmund) og Miriam Michelsen*

Mynd: Vilmund Jacobsen